www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum



# Redaktiónsleiðari

## - Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella roynd innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*

# Starv

## Við hesum verður 1 tíðaravmarkað starv vegna barnsburðarfarloyvi sum tænastufólk hjá Strandfaraskipum Landsins, lýst leyst.

sansir.fo

Viðkomandi skal byrja umborð á Smyrli, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur, sum fyriskipað av leiðsluni. Arbeiðs- og vaktarskipanin verður fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á.

Tíðaravmarkaða starvið er frá 15. august til 31. desember 2006.

Tann, ið settur verður, má kunna byrja beinanvegin.

**Starvið fevnir um**
Starvið fevnir um alt frá vanligum kafeteria- og kioskarbeiði til uppreiðing, reingerð o.a.

**Førleikakrøv**
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv

Annars rokna vit við, at tú hevur góð samstarvsevni, dugur at arbeiða sjálvstøðugt og ert fyrikomandi og røkin.

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att. starvsfókadeildin
Boks 88
110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 6. august 2006.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina á Borg, deildarleiðara, tlf. 343000 ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS



# KREA søkir grafiskan sniðgeva

Vegna vaksandi virksemi søkja vit eftir grafiskum sniðgeva. Ynskiligt er, at tú ert sjálvstøðugur og virkin, hevur evni at koma við góðum hugskotum og dugir at finna røttu loysnina til høvið. Eisini er ynskiligt, at tú dugir at tekna við hond og at arbeiða við Illustrator, Photoshop, InDesign og Flash.

Vit leggja dent á, at tú hevur royndir, so sum at gera kunningartilfar til virkir, og tilfar, sum vendir sær beinleiðis til brúkarar. Tú kemur m.a. at arbeiða við lýsingarátøkum, sniðgeving til internet o.a.

Hevur tú hug at gerast ein partur av einum liði, sum setir høg krøv til dygd á tí, sum gjørt verður, kanst tú senda eina umsókn við viðkomandi skjølum til:

KREA
Att: Oddmar S. Olsen
Heiðavegur 15
600 Saltangará

Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 14. august 2006. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at skriva til oddmar@krea.fo ella ringja á 77 80 80.

Heiðavegur 15 | FO-600 Saltangará | Tel 47 80 80 | www.krea.fo

KREA.FO LÝSINGASTOVA